## Talvið hesa vikuna

**Peter Heine Nielsen (2628) — Curt Hansen (2635)**
**Sigeman (9. umfar) 09.05.04**

**1.d4 Rif6 2.c4 e6 3.Ric3 Bb4 4.Fc2 d5 5.a3 Be7 6.Rif3 0—0 7.Bf4 Ribd7?** (Ófatiligt at ein so royndur telvari sum Curt yvirsær komandi leikrøð) **8.Rib5!** (Sjálvandi) **dxc4** (hetta hjálpir heldur ikki: 8...c6 **9.Bc7 Fe8 10.Rid6 Bxd6 11.Bxd6]** **9.Bxc7 Fe8 10.Rid6 Bxd6 11.Bxd6 b5 12.g3** (Rókafongurin kann bíða) **12...Bb7 13.Bg2 Rib6 14.0—0 Rd8 15.Bxf8 Kxf8 16.Rfd1 Be4 17.Fd2** (Peter Heine hevur sjálvsagt vinnandi fyrimun, men Curt roynir sjálvsagt at sprella, eftirsum 1. pláss stendur uppá spæl) **17...Ria4 18.Rie5 Bxg2 19.Kxg2 Fe7 20.f3 Fd6 21.e4 Rie8 22.Fc2 f6? (Enn ein stórur feilur) 23.Rixc4! Rc8 Støðumynd**




**Støðumynd eftir 23...Rc8**

**24.Fxa4!** og Curt gavst í vónleysari støðu **1-0**

# Vunnu á heimabeiti

**Við at vinna á Curt Hansen í seinasta umfari í Sigeman-kappingini, eydnaðist tað Peter Heine Nielsen at fáa deilt fyrsta pláss saman við júst Curt. Norska undurbarnið Magnus Carlsen varð nummar trý**

TALV
*Carl Eli Nolsøe Samuelsen*

Sjáldsamur vinnaravilji merktist í sterku stórmeistarakappingini í Keypmannahavn, sum endaði sunnukvøldið. Fáir skjótir javnleikir undir 25 leikir, og hinvegin nógv telving við offrum og taktiskum finessum.

Serliga vórðu tað vælkendi Tiger H. Persson, Curt Hansen og 13 ára gamli Magnus Carlsen úr Noregi — ið júst er vorðin stórmeistari — sum telvaðu sera fantasiríkt og settu sín dám á kappingina. Curt, sum eftirhondini er gamal í garði í slíkum kappingum, telvar vanliga heldur varið. Men ikki sást varligi stílurin aftur í Sigeman, tvørturímóti. Tíbetur tykist tað sum um hann hevur broytt stíl, eins og Peter Heine gjørdi fyri 3 árum síðani, og úrslitið sæst hareftir.

### Curt solo

Eftir at Peter Heine fyri tveimum árum síðani yvirhálaði Curt á ratinglistanum, hevur Curt nú svarað aftur; undan Sigeman, hevði fyrrnevndi 2628, meðan Curt hevði 2635. Báðir fara nakað fram eftir góða úrslitið í kappingini.

Tað varð eingin sum væntaði, at Curt fór at takast aftur. Hann legði seg á odda í 3. umfari, og fram til níggjunda og seinasta umfar hevði hann trygga leiðslu. Munurin var eitt stig niður til Peter Heina, sum sjálvur lá hálvt stig framanfyri tríggjar telvarar, eitt nú Magnus Carlsen.

The Big Dane, sum Peter Heine mangan verður nevndur, hevði hvíta fólkið í sonnum endabraki móti oddamanninum. Púra óvæntað telvaði Curt stak illa, og varð blástur av talvborðinum eftir einans 24 leikir. Longu í 9. leiki leikti hann skeivt og misti rók fyri bisp. Skelkurin varð somikið stórur, at longu fáir leikir seinni misti Curt eina finnu, og gavst. Tískil mátti Curt taka til takkar við deildum fyrsta plássi.

Endaliga støðan:

| | | |
|---|---|---|
| Peter Heine Nielsen | (2628) | 6,0 |
| Curt Hansen | (2635) | 6,0 |
| Magnus Carlsen | (2552) | 5,5 |
| Alexander Beljavsky | (2667) | 5,0 |
| Eduardas Rozentalis | (2619) | 4,5 |
| Jonny Hector | (2512) | 4,5 |
| Evgeny Agrest | (2601) | 4,0 |
| Tiger H. Persson | (2513) | 3,5 |
| Nick de Firmian | (2542) | 2,5 |
| Jacob Aagaard | (2400) | 2,5 |

Beljavsky, 50, leikti seg væl innaftur í hitan, eftir eina ringa kappingarbyrjan. Tó er úrslit hansara ikki nøktandi. Somuleiðis kunnu Agrest og de Firmian ikki vera nøgdir við avrikini.





**Til sølu**

**Ognin matr. 1381E og 1381F, Tórshavn, Heykavegur 6, Tórshavn, verður við hesum lýst til sølu**

Til ognina hoyrir virkisbygningur, partvís í tveimum hæddum, til støddar 2.968 $m^2$ brutto, privat parkeringsøki til støddar 2.400 $m^2$ og stórt alment parkeringsøki. Goymslu-/amboðsskúrar uppá 271 $m^2$ hoyra eisini til ognina.

Byggiár: 1978

Ognin liggur væl fyri á ídnaðarøkinum á Hálsi og hevur tvær tilkoyringar.

Ognin verður seld um hóskandi boð fæst.

Áhugað kunnu venda sær til Føroya Tele, Jens Wang, tlf. 303030 ella 303377.

FØROYATELE






**Hervið verður søkt eftir manning til Norrönu.**

Talan er um øll størv innan catering:

- móttøkufólk
- tænarar
- reingerðarfólk
- fólk í kafeteria
- barrfólk
- kokkar
- bakarar
- goymslufólk



Smyril Line sóknast eftir fólki við royndum á høgum, altjóða tænastustigi. Tað er eitt krav, at umsøkjararnir duga væl enskt, hava góð samstarvsevni og duga at arbeiða undir trýsti uttan at missa yvirlitið.

**Heilsuprógv fyri sjófólk krevst** (ikki eldri enn 2 ár).

Tað er ein fyrimunur at hava trygdarskeið (ikki eldri enn 5 ár).

Smyril Line bjóðar størv í einum umhvørvi við góðum møguleikum fyri persónligari og fakligari menning.

Umsóknir og CV skulu sendast til:

**Smyril Line**
**Manningardeildin**
**Jónas Broncks gøta 37**
**Postboks 370**
**FO-110 Tórshavn**

Ella við telduposti til:

**technical@smyril-line.fo**

SMYRIL LINE

J. Broncks gøta 37 · Postsboks 370 · FO-110 Tórshavn
Tlf: 34 59 00 · Fax: 34 59 50 · booking@smyril-line.fo




# Guri og Bjartur gjørdust meistarar

**Guri Poulsen og Bjartur Lamhauge, sum bæði eru úr HBF, vunnu um vikuskiftið FM-heitið í badminton fyri einstaklingar**

BADMINTON
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Bjartur Lamhauge sæst her uttast til høgru við sjónliga tekininum um, at hann aftur í ár kann rópa seg besta badmintonleikara í landinum*

Hetta hendi leygardagin, tá finalurnar vóru á skránni, eftir at innleiðandi dystirnir vórðu leiktir fríggjadagin.

Serliga var tað í mansfinaluni, at spenningurin undan kappingini var stórur. Meistarin frá í fjør, Bjartur Lamhauge, hevði ligið sjúkur undan vikuskiftinum, og við eini finalu móti Ragnari Rasmussen, vóru ikki ráð til mistøk av nøkrum slag. Fyrsta settið tóktist tað heldur ikki, sum um Bjartur hevði nakran livandi møguleika, men í teimum báðum næstu settunum gjørdist alt meira spennandi. Leingi stóð mest sum á púra jøvnum, men í báðum førum eydnaðist kortini Bjarta at toga seinastu kreftirnar fram, soleiðis at hann eftir meira enn ein tíma kundi staðfesta, at hann aftur í ár kann rópa seg føroyameistara.

Úrslitini í finalunum vóru annars hesi:

**Einmansleikur, kvinnur**
Guri Poulsen-Ingun Hansen 2-0 (11/2, 11/8)

**Einmansleikur, menn:**
Bjartur Lamhauge-Ragnar Rasmussen 2-1 (2/15, 15/10, 15/12)

**Tvímansleikur, kvinnur:**
Guri Poulsen & Guðrun Jacobsen – Ingun Hansen & Borglis Fagradal 2-0 (17/15, 15/3)

**Tvímansleikur, menn:**
Bjartur Lamhauge & Aksel Poulsen – Ragnar Rasmussen & Rani í Líð 2-0 (15/3, 15/4)

**Blandaður tvímansleikur**
Aksel Poulsen & Ingun Hansen – Rani í Líð & Guri Poulsen 2-0 (15/11, 15/6)

## Nýggj HB-síða

»Eg eri HB-fan« hoyrast soleiðis á leið helvtin av havnarfólki í hesum døgum ganga og murra, og nú hava hesi so eisini fingið sína egnu heimasíðu.

Mítt Havnarlið er nevnliga ein nýggj fjepparasíða, sum júst hevur sæð dagsins ljós, og er tað fyrst og fremst – ella skuldu vit sagt bara – HB, sum er á skránni í hesari.

Enn er tó ikki tað heilt stóra, sum er komið upp á innihaldið á síðuni, men eitt kjak-forum er so til teirra, sum vilja sleppa sær av við eitt sindur av luft. Slík kjakforum hava annars verið roynd á flestu síðunum, men tær almennu hava tó mest sum allar stongt fyri hesum aftur, tí óhøvisku viðmerkingarnar gjørdust ov nógvar í tali.

Í so máta hava óalmennu síðurnar ikki heilt sama trupulleikan, og so fæst at síggja, hvørt kjakið á hesari fer at verða eins nógv nýtt, sum tað var á almennu HB-síðuni.

Leinkjan til nýggju síðuna er, www.hb1904.tk

**-jm**










MÓTTØKA

Á KONGABRÚNNI
13. MAI 2004

Nú Tryggingarfelagið Føroyar er flutt í nýggj hølir á Kongabrúnni, bjóða vit til móttøku

13. mai kl. 15.00 til 17.30

har høvi verður at síggja nýggja bygningin.

Nógv forvitnisligt verður á skránni.
Edvard Nyholm Debess og Finnur Hansen spæla móttøkutónleik. Klassisk stykkir við Jóhannes Andreasen og Sámal Petersen. Dupultkvartettin í Ebenezer syngur føroyskar sangir. Leikarar úr sangleikinum "Jósef" framføra brot.

Øll eru vælkomin.

TRYGGINGARFELAGIÐ FØROYAR
- so ert tú tryggari